

Mynd: Harald Pettersen/Statoil.

# Oljuprísurin rakar stórar oljuætlanir

**Jógvan Hugo Gardar**

14.11.2014 - 13:30

Oljan.fo

Í gjár kom prísurin á Norðsjóvarolju niður á 79 dollarar fatið. Tað sama hendi eina løtu mikudagin. Hetta gjørdi at oljufeløgini á keypsskálanum í Oslo eisini lækkaðu í virði. Prísurin á amerikansku oljuni er einar tveir dollarar lægri enn tað Norðsjóvaroljan verður seld fyri.

Alexandre Baradez, greinari hjá IG France, sigur, sambært offshore.no, at 80 dollarar er pínumarkið hjá nógvum oljufeløgum.

- Kemur prísurin niður á 70-talið, so er lønnsemi burtur í fleiri stóri oljuætlanum. Harafturat fáa fleiri stór oljulond fíggjarligar trupulleikar sigur Baradez.

Hann heldur at lági oljuprísurin eisini kann raka ES-lond, tí lági oljuprísurin trýstur inflasjónina niður, og hon er longu metlág.

Oljuprísurin er at kalla samanhangandi lækkaður síðani hann náddi ein topp í juni uppá 115 dollarar fatið. Orsøkin er millum annað at bæði ES og Kina hava tað tungt búskaparliga